# Hepnið við HB

**VODAFONEDEILDIN** So gjørdi HB tað aftur. Uttan at spæla væl, og uttan at koma fram til nógvar málmøguleikar, so eydnaðist teimum at vinna týdningarmikla útidystin ímóti Víkingi. Stóra hetjan hjá havnarmonnum gjørdist Fróði Benjaminsen, sum skoraði einasta málið í einum dysti, sum var merktur at rótutum spæli og fáum málmøguleikum Sigurin hevur við sær at HB nú bert er eittans stig frá oddasessinum, meðan FM vónin hjá Víkingi fekk eitt skot fyri bógvin

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| Víkingur | 0 |
| HB | 1 |

Tað var ikki nógv sum bendi á at nakað mál skuldi koma í dystinum. Tað kundi tykjast sum um dysturin var merktur av týdninginum, og tí vóru bæði liðini varin við ikki at gera mistøk.

Tískil skuldi ein tilvildarlig støða til áðrenn avgerðandi málið kom. Sum so ofta áður, var tað HB liðskiparin, Fróði Benjaminsen, sum gekk fremst og skoraði einasta málið í dystinum, tá hann var fyrstur á einum returi frá Geza í Víkingamálinum, og setti bóltin trygt í netið. Hóast málið ikki var tað vakrasta, so hevði tað alstóran týdning fyri havnarmenn, sum gevur nýtt lív til FM vónirnar hjá HB.

Sostatt vann HB enn eina ferð uttan at vísa tað heilt stóra. Gott spæl ella ikki, so hevur sigurin á Víkingi við sær, at HB nú eru í hølunum á runavíkingum í oddastríðnum, og tað er nokk meira týdningarmikið enn poleraða fótbóltsspælið, tá alt kemur til alt.

### – Vit vóru heppnir

Nýggi HB venjarin var sum vera mann sera fegin um at fáa trý stig í fyrsta dystinum við stýrisvølin, men ásannaði tó, at hansara spælarir høvdu neyðuga heppnið við sær.

– Eg eri sjávandi sera fegin um at fáa sigurin í hús. Talan var um ein sera javnan dyst, sum kundi farið báðar vegir. Víkingur legði okkum undir eitt ávíst trýst í seinra hálvleiki, men uttan at koma fram til møguleikar. Í staðin høvdu vit neyðuga heppni við okkum, og skoraðu einasta málið í dystinum, segði Julian Hansen.

### Rótutur dystur

Sum heild gjørdist talan um ein sera javnan dysti, har bæði liðini høvdu stórar trupulleikar at koma fram til líkinda málmøguleikar. Til tað var leikferðin alt ov lág, og somuleiðis tyktist týdningurin av dystinum at seta síni tíðiligu tekin á dystargongdina.

Av tí sama bleiv talan um ein heldur rótutan dyst, har langt var millum málmøguleikarnar. Einasta ljóspunkt í fyrra hálvleiki var Símin Samuelsen, sum við fleiri góðum einmans avrikum kláraði at koma aftur móti baklinjuni, men sigandi fyri dystargongdina, so høvdu innleggini ikki sama kvalitet sum forarbeiðið.

### Fróði á blettinum

Í seinra hálvleiki vóru tað heimaliðið, sum var spælstýrandi. Men hóast teir royndu, so eydnaðist teimum ikki at koma fram til líkinda kjansir, eina mest tí leikferðin var alt ov lág, samstundis sum HB verjan stóð stinn.

Sum minuttirnir gingu tóktist sum um liðini settu seg til rættis, og býta stigini millum sín. Men Fróði Benjaminsen vildi tað ørvíst, tá hann gagnnýtti eina heldur tilvildarliga støðu og setti bóltin trygt í netið.

Harvið kom HB á rættkjøl aftur, eftir óvæntaða tapið í síðstu viku, meðan jaliga gongdin, og harvið eisini FM vónirnar, hjá Víkingi fingu ein álvarsligt skot fyri bólgvin.

*post@sosialurin.fo*



HB liðskiparin, Fróði Benjaminsen, skoraði sigursmálið

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Nýggja venjaraparið hjá føroyameistarunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Bara eitt stig móti HB

Víkingur fekk bara eitt stig móti HB í trimum dystum í Vodafonedeildini. Tá liðini hittust í Sarpugerði í øðrum umfari var úrslitið 0-0. Liðini hittust aftur í Gundadali í 11. umfari. Tá syrgdu Tór-Ingar Akselsen og Levi Hanssen fyri, at HB vann 2-0. Í gjár var tað so Fróði Benjaminsen, sum skeyt avgerandi málið. Víkingur fekk tí einki mál móti HB í hesum kappingarárinum. HB er fýra stig framman fyri Víking á stigatalvuni, og tað kann staðfestast, at innanhýsisuppgerðirnar hava havt stóran týdning í so máta.

## Fróði Benjaminsen:
## Týdningarmikil sigur

– Vit vistu at talan beiv ein truplan dyst, tí bæði liðini skuldu helst vinna fyri at halda sambandið við oddaliðið, segði liðskiparin hjá HB, Fróði Benjaminsen, sum skoraði einasta málið í 1-0 sigrinum á Víkingi.

– Tað er sjávandi stuttligt at skora sigursmálið, men tað er meira umráðandi hjá okkum at vinna dystin, segði Fróði

– Nú mugu vit halda fokus á okkara egnu avrik, og taka ein dyst í senn, tí tað nyttar onki, at vit vinna í Gøtu, fyri síðan at tapa ein av næstu dystunum, segði Fróði Benjaminsen at enda.